## Zuma nevndur í skotbardaga




Tað gekk ikki eftir bókini hjá Sibusiso Zuma, sum í dag skuldi fara úr heimlandinum til Týsklands, har hann til dagligt leikar yrkisfótbólt við Arminia Bielefeld. Tá ið Zuma var komin á flogvøllin, stóðu suðurafrikanskir myndugleikar og noktaðu honum at fara umborð á flogfarið. Teir hava lagt hann undir at hava verið við í einum skotbardaga, sum fór fram undir einari veitslu fyri tveimum vikum síðani. Sjálvur sigur Zuma, at hann varð álopin av vápnaðum monnum, og at hann bara vildi verja seg.

## Einki boð upp á Torres

Fleiri av størstu feløgunum í Evropa hava í fleiri ár havt eitt gott eyga til spanska landsliðsleikaran, Fernando Torres, sum spælir fyri Atletico Madrid. Síðstu tíðina hava serliga Champions League vinnararnir úr Liverpool verið nevndir sum ein komandi arbeiðsgevari hjá Torres, men presidenturin í Atletico Madrid, Enrique Cerezo, sigur, at teir einki boð hava fingið upp á talentfulla áleyparan. – Allir spælararnir hjá Atletico Madrid kunnu keypast úr sáttmálanum, so vit kunnu einki gera, um rætta boðið kemur. Men vit hava einki boð fingið upp á Torres, heldur ikki frá Liverpool.

# Havfrúgvin vann trygt




*Havfrúgvin vann næsta róðurin á rað hjá 5-mannaførum við dreingjum, og nú eru dreingirnir úr Vestmanna einsamallir á odda í FM-kappingini*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*

**Kappingin hjá 5-mannaførum við dreingjum hevur verið hørð í millum Havfrúnna og Sílið, men á Jóansøku lat Havfrúgvin ongan iva vera um sigurin**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein av kappingunum, sum hevur verið rættiliga spennandi eftir fyrstu tveir róðrarnar, er kappingin hjá 5-mannaførum við dreingjum. Her vann Sílið fyrsta róðurin á Norðoyastevnu, meðan Havfrúgvin sigraði á Sundalagsstevnu. Tí var púra javnt í FM-stríðnum undan róðrinum á Jóansøku leygardagin.

Her var tað tó Havfrúgvin úr Vestmanna, sum setti dagsskránna. Havfrúgvin fekk eina góða byrjan á Tvøroyri og legði seg fram í oddin mest sum alt fyri eitt. Bæði Sílið og Teistin royndi at fylgja við, og fyrstu 500 metrarnar var munurin heldur ikki tann heilt stóri á bátunum.

Tað var tó alla tíðina líkt til, at Havfrúgvin fór at gerast tann drúgvasti av teimum trimum. Dreingirnir róðu sera væl, og tá teir fóru undir endaspurtin var tað eisini við Havfrúnni á fremsta rók, meðan Sílið og Teistin vóru ógvuliga javnir á øðrum og triðja plássi.

Í endaspurtinum var tó eingin ivi. Her setti Havfrúgvin alla kapping til viks, og tá bátarnir komu á mál, var Havfrúgvin eina heila bátslongd framman fyri næsta bátin. Kappingin um annað plássið var tó hørð millum Sílið og Teistan, men at enda dró Teistin longra stráðið og endaði á øðrum plássi, meðan Sílið mátti taka til takkar við bronsuni.

# Kappingin er um annað plássið

**Hjá 8-mannaførunum var Heiðabáturin enn einaferð nógv sterkast, meðan kappingin um annað plássi var hørð stóran part av róðrinum millum Argjabátin, Ørv og Árnfirðing**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrstu tveir róðrarnar hevur Heiðabáturin mest sum vundið burtur úr hinum bátunum. Teir hava vunnið báðar róðrarnar við fleiri bátslongdum niður til næstu bátarnar, og á Jóansøkuni var tað aftur Heiðabáturin, sum leyp avstað beinan vegin.

Tann guli Heiðabáturin var eina bátslongd framman fyri hinar bátarnar eftir eini lítlari løtu, og longu tá var greitt, at kappingin í hesum róðrinum fór at vera um annað plássið.

Undanfarnu róðrarnar hevur Argjabáturin fingið tvey annað pláss í harðari kapping við Ørv, og tað vóru aftur hesir báðir, sum høvdu ein harðan dyst um silvurkrúnurnar á Jóansøku. Ein triði bátur vildi tó eisini vera við, tí Árnfirðingur hevði mest sum alla tíðina hug at blanda seg í stríðið um annað plássið.

Sum bátarnir nærkaðust málinum var greitt, at her fór eingin at hótta Heiðabátin, sum fyri triðju ferð í ár vann í stórum stíli. Kappingina um annað plássið megnaði Argjabáturin at vinna góða hálva bátslongd framman fyri Ørv. Árnfirðingur endaði á fjórða plássi upp aftur góða hálvu bátslongd aftari.

Undan Varmakelduni er spurningurin, um nakar av bátunum megnar at steðga Heiðabátinum, ella um teir enn einaferð skulu berjast um silvurheiðursmerkini.



*So stórur munur var á fremstu bátunum, tá Heiðabáturin vann triðja róðurin á rað hjá 8-mannaførunum. Kappingin tykist í løtuni bert at vera um annað plássi millum Argjabátin og Ørv*

*Mynd: Ólavur Fredriksen*